EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

# Lærarastørv í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir 11 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at byrja 1. august 2007

- 8 størv fyri lærarar í farloyvi
- 1 fyri lærara við niðursettari tíð
- 2 størv, fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi. 1 fyribils til 20. januar 2008 og 1 fyribils til 14. mars 2008

Skúlanum tørvar bæði lærarar, sum kunnu undirvísa í innskúlingini, miðdeildini og lærarar til framhaldsdeildina.

Í innskúlingini og miðdeildini er brúk fyri lærarum at undirvísa í máli, handverk/list og ítrótti. Í framhaldsdeildini er brúk fyri lærarum at undirvísa í týskum, støddfrøði, alis/evnafrøði og ítrótt.

Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 –27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**

- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Søkt verður eftir lærarum sum:**

- hava læraraútbúgving
- duga væl at samstarva og samskifta
- áhaldandi vilja menna seg sjálvan og skúlan
- ikki ræðast nýggjar avbjóðingar
- seta tollyndi í hásætið

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752

**Eysturskúlin**
Tórgarðsgøta 17
100 Tórsahvn

Í Eysturskúlanum verða komandi skúlaár 537 næmingar í 1. til 10. flokki og uml. 48 lærarar. Skúlin verður skipaður í sjálvstýrandi toymi. Meginreglan er, at lærarar arbeiða í einum toymi burturav. Í hvørjum toymi eru 4-5 flokkar. Vit hava skúlaárið 2006/2007 arbeitt við at orða virðisgrundarlag Eysturskúlans. Vit hava valt at leggja dent á »Tollyndi« í fyrstu syftu, tí vit meta, tað hevur so stóran týdning og er grundleggjandi fyri alt virksemi skúlans.

# Götu Kommuna

## Pedagogar søkjast til Frítíðarskúlan í Gøtu

**Søkt verður eftir :**
2 pedagogum á 20 t. viku, at byrja 13 aug.

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum umhvørvi, nær við spæliplláss og sandin, í Syðrugøtu.

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m. a. dent á :**

- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barni í bólkinum

**Vit ynskja av tær :**

- at tú er álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi

Lønin er sambart sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og fylgir lønarstigunum frá 11 – 17.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Hannu E. Olsen leiðara, fartlf. 771009. Skrivlig umsøkn, við avrit av prógv og ummælum, skal sendast okkum í seinasta lagi mánadagin 18 juni kl. 10.00.

Bygdaráði skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsøknirnar ella onga at taka.

Umsóknir skulu sendast til:

**Frítíðarskúlin í Gøtu**
Fyri oman brúgv 3
FO – 513 Syðrugøta

# RITSTJÓRASTARV

## á Bókadeild Føroya Lærarafelags

Eitt fulltíðarstarv sum ritstjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags er leyst at søkja frá 1. august 2007.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, rættlestur, samskifti við útlendsk forløg og mangt annað.

Til starvið krevst yrkisligur førleiki, góður kunnleiki í føroyskum, norðurlendsku málunum og enskum, og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bókadeildina á tlf. 317644, ella á bfl@bfl.fo

Skrivlig umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum viðmælum skal vera Bókadeildini í hendi 22. juni 2007:

**Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Postrúm 3264
FO-110 Tórshavn




**Bókadeild Føroya Lærarafelags** er stovnur undir Føroya Lærarafelag, sum varð stovnaður í 1956. Forlagið gevur fyrst og fremst úr barna- og ungdómsbøkur, men eisini aðrar bókmentir, einar hálvt hundrað um árið tilsaman. Umframt hevur forlagið um hendi barnablaðið Strok og Skúlablaðið. Á Bókadeildini starvast trý fólk.

# Starvsfólk til handilin SIRI

Søkt verður eftir fólki til niðursetta tíð, at arbeiða seinnapartar og annan hvønn leygardag. Eisini verður søkt eftir fólki til fulla tíð, at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

Løn sambært avtalu.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við Siri á tel 210506

SIRI

DR. JACOBSENSGØTA 18 · TÓRSHAVN · 31 66 10

# LITAVAL P/F

Søkt verður eftir sølufólki at byrja beinanvegin. Arbeiðið umfatar sølu av máling v.m. í deild okkara í J.C. Svabosgøtu.

Ert tú ágrýtin og hugagóð/ur, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á telefon nr. 313825 og spyrja eftir Snæbjørn.



# Renault Trafic til sølu

Eitt ára gamal Renault Trafic 140 DCI. Tað størra modelli/størra motorin. Bilurin hevur sleipikrók.

Hevur koyrt: 24.500 km

Prísuppskot: 168.000 kr.

**Ring á tlf 26 73 73**

# Føroya Heimavirkisfelag

Ársaðalfundur felagsins verður hildin leygardagin 2. juni í Tilhaldinum, Tórsgøta 21, Tórshavn, kl. 14.00, við skrá sambært viðtøkum felagsins. Eisini sigur Annika Y. Skaalum frá um Bindiklubbar í Føroyum, sí eisini www.craft.fo.

*Nevndin*

# Arbeiðshandskar

**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820